

*Hugmynd, búpláss niðri í Toftum*

# Niðri í Toftum

**Anna Katrin Matras**

Niðan fyri vegin, beint áðrenn koyrt verður inn í Norðoyatunnilin Klaksvíksmegin, liggur plássið, ið rópt verður Niðri í Toftum. Hetta er niðri á bakkanum heimanfyri Vágklett og beint uttanfyri Grækarisargil. Á hesum staði eru staðfestar leivdir eftir eldri búseting. Talan er um toftir, ið stava heilt aftur til vikingatíð. Á hesum staði hevur búseting í øllum førum verið fram til miðøldina, men síðani frágingið sum búpláss. Seinni í tíð síggjast tó leivdir eftir øðrum virksemi á sama staði.

Staðarnavnið hevur allar tíðir borid brá av, at toftir mundu goyma seg her. Hetta hava fólk í Klaksvík haft í huga og tosa um gjøgnum tíðina. Onkur hevur fegin vilja fregnast um, hvat mundi goyma seg undir svørðinum. Fleiri eru tey, sum hava víst hesum plássi serligan áhuga, og gingið sær túrar niðan á Bordoyavík at vitja. Sum øllum kunnugt, er her talan um brimpláss, og tí gjørdist sjón fyri søgn, tá leivdir sóust í beninum í bakkanum. Tad vísti seg eisini, at fólk funnu gripir liggjandi í fjøruni, ið heilt víst stavaðu frá leivdunum í bakkanum. Ein av teimum, sum hevði serligan áhuga fyri hesum mentannararvi var Sámal Petersen sáli. Hann setti seg tí í 1960'unum í samband við Føroya Fornminnisavn fyri at fáa kannað hvørjar leivdir talan var um. Hetta var byrjanin til eina fornfrøðiliga kanning, sum byrjaði í 1969.

Hóast skjótt 40 ár eru liðin síðani byrjað varð, so má staðfestast, at rannsóknin

framvegis ikki er liðug, og tí er heldur ongin endalig frágreiðing gjørd. Sigast kann tó frá, hvat higartil er komið undan kavi.

Talan er, sum longu nevnt, um fleiri búsetingarumfør. Elstu leivdirnar eru frá einum langhúsi við bogaðum veggjum. Tá rannsóknin byrjaði, varð beinanvegin staðfest, at helmingurin av hesum húsi longu var farið við briminum, og tí eru mátini fyri húsið ikki kend. Tad, sum eftir er, er norðari endaveggurin og partar av báðum langveggjunum. Við tí skapi húsið hevur, kann longdin metast at hava verið á leið 14 metrar og breiddin 4,5 metrar. Leivdir eftir langeldi sóust eisini í gólvinum. Fleiri fláir vóru staðfestar, ið vísa, at har hevur verið búseting leingi.

Sunnanfyri nevndu toftina var onnur toft funnin. Talan er her um eini minni langhús, eisini við langeldi, men her er allur eystari langveggur farin í havið. Samstundis er sunnari endaveggur órógvaður av virksemi frá miðøldini.

Omaná hesum minna langhúsi var eitt minni fýrkantað hús frá miðøldini, vid fýrstaði í horninum. Hetta er eisini tann yngsta leivdin eftir búseting á staðnum. Sunnanfyri hesa og partvís omaná vestvegginum av elsta langhúsinum varð steinsett støðið funnið, sum kann hava verið eitt tún ella desastøði. Miðskeiðis ímillum hesar leivdir varð staðfest leivd eftir einum myllustøði, vid veiting úr ánni nordanfyri. Tad er hendan leivdin, sum hevur órógva tann sunnara endan av tí minna langhúsinum.

Í fláum omaná hesum nevndu toftum eru toftir frá búðarhjalli og øðrum úthúsum staðfestar. Økið er partur av Uppsølum, og fólk av Uppsølum hava gjøgnum tíðirnar brúkt økið Niðri á Toftum til úthús, umframt at tey eisini høvdu neyst á bakkanum her.

Gripirnir, sum eru komnir undan kavi í hesi rannsókn peika á ein gerandisdag, sum vit kenna hann frá øðrum rannsóknum frá sama tíðarskeiði í Føroyum. Talan er um amboð úr gerandisdegnum so sum brýni, vaðsteinar, kolur, rennlar úr fitisteini og royðugróti, klíggjarsteinar, ílatabrot úr fitisteini og leiri, brot av bakiplátum, men eisini prýðislutir sum perlur. Nakað av viði er eisini funnið, og eisini baraldarbond.

Hvørji fólkini sum búleikaðust her vóru, er ilt er at siga nakað beinleiðis um. Rannsóknin er sum áður nevnt ongantíð gjørd liðug, og so tað, at so nógv longu er farið í havið. Sjálvandi hevur tað verið ymiskt hvussu nógv er farið í havið, men vit kenna øll serligt illveður við stórum uppgangi, har rættuliga nógv er horvið eftir lítlari løtu. Bara tey seinastu hálvthundrað árini má talan vera um nærum 1 metur av lendi, sum er burtur. Vit kunnu ímynda okkum, at tá hesi fólk valdu at búseta seg við Borðoyavíkina, sá hon ikki út sum hon ger nú á okkara døgum, tí ikki hava tey bygt sær



*Hugmynd, búpláss úti í Grøv*

hús uttast á bakkanum. Roknast má tí við, at bakkin í víkingatíð hevur gingið nógv longri út. Nógv annað, sum lá uttanfyri hesar toftirnar, má tí vera farið í havið.

Hinumegin vikina, í Grøvini, síggja vit leivdir av bæði húsi, myllu og neystum, har havið ikki hevur etið seg inn í lendið. Her eru góðir møguleikar at staðfesta eina heildarmynd av tí fólki og tí samfelagi, sum vóru á hesum leiðum fyri meiri enn 1000 árum síðani. Longri úti á eystara armi av Borðoyavíkini, Eysturi í Hópinum í Norðoyahaganum, er nú so lítið eftir av leivdunum av toftum har, at ilt er at síga um ein rannsókn kann geva okkum bert ein part av eini heildarmynd. Hetta eigur at geva okkum nakað at hugsa um, tá talan er um okkara mentannararv. Vilja vit vita hvørji gingu undan okkum, má arbeiðast skjótt. Havið bíðar ikki eftir rannsóknum. Hendan vitan fer so sanniligani eisini at fáa ein stóran týðning, tá talan er um ferða- og upplivingarvinnu, har víkingatiðin eins og miðøldin longu nú gevur eitt stórt búskaparligt íkast í fleiri av okkara grannalondum.